# ARB-Vegleiðing

# V-C002-2

**Persónlyft við gaffiltrukkum**

# 2007/11

# Arbeiðseftirlitið

## Hvat er ein ARB-Vegleiðing?

ARB-vegleiðingar vegleiða um hvussu reglurnar í arbeiðsumhvørvislógini skulu skiljast/tulkast. ARB-vegleiðingar verða brúktar til at:

- greina út orð og setningar í reglunum (lóg og kunngerðir),
- greiða frá hvussu krøvini í reglunum kunna lúkast í royndum,
- greiða frá vitan um tulkingar av reglunum í samband við dómar,
- greiða frá hvussu arbeiðsumhvørvislógin er samansett og hvørji øki hon umfatar.

## Er ein ARB-vegleiðing bindandi?

ARB-vegleiðingar eru ikki bindandi fyri virkir, trygdarskipan e.o., men vegleiðingarnar eru skrivaðar út frá reglum (lóg og kunngerðum), sum eru bindandi.

Arbeiðseftirlitið setir ikki onnur krøv, um t.d. eitt virki hevur gjørt sum tilskila í eini vegleiðing.

Virkini kunna loysa uppgávurnar á annan hátt, men Arbeiðseftirlitið vil tá meta um, um hesin háttur er líka so tryggur og í trá við reglurnar.

**Arbeiðseftirlitið**
**Boks 1400**
**FO-110 Tórshavn**
**Tlf.: + 298 357811**
**Fax.: + 298 357810**
**T-post.: arb@arb.fo**
**Heimasíða: www.arb.fo**

## KAPITTUL 1.

***Lýsing*.**
**§ 1.** Gaffiltrukkur er bert innrættaður til at lyfta góðs við. Tað er tó loyvt at lyfta persónar í góðkendari arbeiðskurv á gaffiltrukki, tá fylgjandi treytir eru loknar:

## KAPITTUL 2.

***Arbeiði*.**
**§ 2.** Persónlyfting má bert gerast av og á til lættari arbeiði, so sum skifting av ljósperum og -rørum, lættari uppsetingararbeiði, reingerðing, málaraarbeiði og líkn.

## KAPITTUL 3.

***Trukkurin*.**
**§ 3.** Lyftievni hjá trukkinum skal verða í minsta lagi 4 ferðir vektina av arbeiðskurv við hægst loyvdu last.

**Stk. 2**. Tjúktin av gaflunum má ongastaðni verða slitin meira enn 5%.

**Stk. 3.** Gaffiltrukkur av mótvektsslagnum skal kunna lyfta í minsta lagi 1.800 kg og hava eina sporvídd uppá minst 0,9 metur.

**Stk. 4.** Onnur sløg av trukkum, har tyngdardepilin er innanfyri stuðulsflatuna, skal kunna lyfta í minsta lagi 1.200 kg og eginvektin av trukkinum skal verða í minsta lagi 2.000 kg.

**Stk. 5.** Um brot kemur á oljutrýstskipanina, má fallferðin ikki koma upp um 0,5 m/sek.

**Stk. 6.** Trukkurin skal hava malandi ávaringarljós.

## KAPITTUL 4.

***Arbeiðskurv*.**
**§ 4.** Samlaða vektin av kurvini við fullari last má í mesta lagi verða 500 kg. Í mesta lagi 2 persónar mugu lyftast í senn.

**Stk. 2.** Gólvflatan má í mesta lagi verða 1,2 x 1,2 m og ikki minni enn 0,6 m² fyri hvønn persón. Gólvið skal verða glíðitrygt og tilgjørt úr plátutilfari (ikki timbur), ella t.d. úr tættmeskaðum stálneti (meskavídd hægst 15 mm).

**Stk. 3.** Kurvin skal hava ein 10 cm høgan tættan fótlista á øllum síðum. Síðurnar av kurvini kunna verða gjørdar úr sama tilfari sum gólvið. Síðan inn móti mastrini skal verða í minsta lagi 1,9 m høg og minst líka so breið sum masturin. Hinar síðurnar á kurvini skulu verða í

minsta lagi 1 m høgar og hond- og knælisti skal verða allan vegin runt. Fótlistin skal verða gul/svart strípputur uttan. Hondlistin skal verða 10 cm innanfyri og 10 cm omanfyri kantin á síðunum.
Portrið í gyrðingini má ikki kunna opnast úteftir og skal hava sjálvvirkandi lás.

**Stk. 4**. Kurvin má bert kunna setast á trukkin í rættari støðu og skal læsast til gaflarnar við tveimum lásiskipanum, sum skal kunna síggjast frá kurvini. Botnurin av kurvini má í mesta lagi verða 100 mm yvir ovaru flatu av gaflunum.

**Stk. 5.** Hólkar ella lykkjur fyri gaflarnar skulu ikki verða meira enn 150 mm innan fyri síðunum av kurvini. Innanmát teirra má ikki vera meira enn 50 mm størri enn breidd gaflanna og hæddin í mesta lagi 20 mm meira enn tjúkt gaflanna.

**Stk. 6.** Kurvin skal hava eitt skelti, har bókstavirnir í minsta lagi eru 20 mm høgir.

Á kurvini til tveir persónar skal teksturin verða:
*"Mesta last 2 persónar og ... kg ella 1 persónur og ... kg."*

Á kurvini til ein persón skal teksturin verða:
*"Mesta last 1 persónur og ... kg."*

**Stk. 7.** Hjá stýriskipanini skal eitt skelti verða við teimum neyðugu nýtsluleiðbeiningunum.

Tann loddrætta rørslan av kurvini skal kunna stýrast:
1) antin frá stýriskipanini í kurvini, innrættað soleiðis, at rørslan steðgar, tá ein sleppur hesari, og sum ger, at stýringin frá føraraplássinum á trukkinum verður avbrotin,
2) ella frá tí vanligu stýriskipanini á føraraplássinum, men bert tá ein skipan í kurvini er ávirkað.

Stk. 8. Stýriskipanin skal verða soleiðis sett upp, at ein ikki av óvart kann koma at ávirka hana.

## KAPITTUL 5.

### *Nýtsla.*

**§ 5.** Persónlyfting við trukki má bert gerast við góðkendari kurv.

**Stk. 2.** Trukkførarin skal hava trukkføraraprógv - sí kunngerð nr. K-C002-1 frá 18. juli 1985 um loyvisbræv at koyra gaffiltrukk.

**Stk. 3.** Har fólk verða lyft, skal trukkurin standa á vatnrøttum og burðartryggum undirlagi.

**Stk. 4.** Áðrenn lyft verður skal útgerðin og arbeiðsumstøðurnar kannast av føraranum og tí ella teimum sum skulu lyftast við kurvini.

**Stk. 5.** Tá kurvin er lyft hægri enn 1 m yvir lendi skal trukkurin verða bremsaður, ávaringarljósini tendraði og neyðug sperring sett upp.

**Stk. 6.** Koyring við fólki í kurvini skal gerast við størsta varsemi og bert, tá kurvin er lægri enn 1 m yvir koyribreytina.

**Stk. 7.** Persónar mugu ikki vera - ella ferðast undir kurvini.

**Stk. 8.** Lyftihæddin má í mesta lagi verða 5 m. Um hægri lyft hendingaferð er neyðugt, skal masturin mekaniskt læsast til trukkin.

## KAPITTUL 6.

***Sýn og eftirlit*.**

**§ 6.** Nýggj kurv skal sýnast og roynast av Arbeiðseftirlitinum, áðrenn hon verður tikin í nýtslu. Lýkur hon galdandi treytir, verður hon skrásett og góðkend.

**Stk. 2**. Kurvin skal verða undir støðugum eftirliti og skal sýnast eina ferð í hvørjum álmanakkaári. Fyri nýtt og tíðarásett sýn og roynd, letur eigarin eitt gjald, ið er ásett av Landsstýrinum.

## KAPITTUL 7.

***Ung undir 17 ár*.**

**§ 7.** Ung fólk undir 17 ár mugu ikki nýtast til arbeiði í kurv, tá arbeiðshæddin er meira enn 5 m yvir lendið.

## KAPITTUL 8.

***Gildi fyri reglugerðina*.**

**§ 8.** Hendan reglugerð kemur í gildi 1. januar 2008.

**Stk. 2.** Samstundis fer úr gildi reglugerð nr. R-C002-2 um persónlyfting við trukki

**Arbeiðseftirlitið**, 26. november 2007

____________________________

Karl Joensen, stjóri (sign.)